Jacob Jónsson til Tjaldur

Líkt er til, at Jacob Jónsson komandi ár skal venja runavíkingar. Í hansara stað fær Kyndil Jónleif Sólsker

JÁKUP MØRK

Undanfarna kappingarár hevði Tjaldur ivasama heiðurin av at vera niðasta liðið í bestu mansdeildini, men stendur tað til leiðsluna í felagnum, verður hetta broytt komandi kappingarár.

Jacob skal venja Andreas Jacobsen, formaður í Tjaldrinum, váttar fyri Sosialinum, at teir væntandi skriva undir sáttmála við Jacob Jónsson. Jacob Jónsson hevur sum kunnugt spælt við Kyndli tey bæði seinastu árini, har hann fyrsta árið var leikandi venjari.

Umframt at felagið verður styrkt við íslendinginum, sum nú á triðja ári skal royna seg í Føroyum, er eisini ætlanin at styrkja liðið við øðrum leikarum.

Andreas Jacobsen váttar, at teir í løtuni arbeiða við at fáa aðrar spælarar til felagið, men enn er einki konkret komið burtur úr hesum arbeiði. Tó leggur hann afturat, at ein møguleiki er, at Jens Martin Knudsen verður at síggja á liðnum komandi vetur.

Í fjør spældi hann onkrar einstakar dystir, men tá Íslendska fótbóltskappingin endar áðrenn føroyski hondbólturin fer í gongd, skuldi verið møguleiki fyri, at hann fer at roynast nakað drúgvar hjá Tjaldrinum í ár. Hetta er tó eisini tengt at, um Jens Martin møguliga fer at spæla fótbólt aðrastaðni í vetrarhálvuni.

Jónleif til Kyndil

Sostatt er líkt til, at Kyndil missur ein av lyklaleikarunum á liðnum, men aloftast kemur maður í mans stað, og soleiðis verður eisini hesu ferð.

Jónleif Sólsker, sum annars hevur verið leikandi venjari hjá StÍF, vendir nevnliga aftur til barndómsfelagið, og einki er at taka seg aftur í, at hetta skuldi viga ímóti missinum av Jacob.

Plássið teir báðir spæla, er nevnliga hitt sama, og tá Jónleif frammanundan er kendur í felagnum, skuldu ikki staðist nakrir serligir trupulleikar av at finna seg til rættis í felagnum.

Við tilgongdini av hesum, hevur Kyndil helst fingið ein hin besta spælskiparan í landinum aftur, og spurningurin er so, um hetta verður nóg mikið til at tryggja felagnum meistaraheitið, sum teir nú hava sæð onnur feløg fara avstað við fleiri ár ár rað.

Í øllum førum er sannlíkt, at fjórða plássið frá í fjør skal betrast, og at Jónleif hevur hagtølini við sær í so máta er einki at ivast í. Níggju ferðir hevur hann verið føroyameistari, harav sjey ferðir við Kyndli, og kann hann nú fáa tíggjunda gullmerkið kann ringrásin á ein hátt sigast at vera endað.

Bólkaspælið avgreitt

Seinasti dysturin í bólkaspælinum í kappingini um løgmanssteypið varð leiktur mikukvøldið, so nú er greitt, hvørji lið hittast í fjórðingsfinaluni

JÁKUP MØRK

Mikukvøldið hittustt VB og Sumba í seinasta dystinum í bólkaspælinum í kappingini um løgmanssteypið.

Hvíldu leikarar

Dysturin var nógv merktur av, at bæði liðini ikki løgdu tað stóra í úrslitið.

VB nýtti høvið til at hvíla fleiri av leikarunum, sum dagliga eru fastir á besta liðnum, og sumbingar máttu vera allar leikararnar, sum búleikast í Havn fyri uttan.

Úrslitið av dystinum gjørdist, at vágbingar fingu fýra mál, meðan Sumba fekk tvey, og við sigrinum tryggjaði VB sær annað plássið í bólkinum.

Sum skilst úr Vági, so var VB gjøgnumgangandi betra liðið, og tað eydnaðist teimum eisin at leggja seg á odda við málið, sum Tórður Holm skeyt.

Í seinna hálvleiki javnaði Hallur Dam Joensen fyri sumbingar, tá hann fór ein solotúr gjøgnum verjuna hjá VB.

Vágbingar svaraðu tó aftur, og Petur Óli Samuelsen, Birgir Nielsen og Niklas Ludvig broyttu støðuna til 4-1, áðrenn Bergur Vinther minkaði um munin móti endanum.

VB-Sumba 4-2 (1-0)

1-0 Tórður Holm
1-1 Hallur Dam Joensen
2-1 Petur Óli Samuelsen
3-1 Birgir Nielsen
4-1 Niklas Ludvig
4-2 Bergur Vinther

Fjórðingsfinalurnar verða leiktar soleiðis:

21.05	B36-HB	Jens Petur Brattalíð
21.05	B68-VB	Petur Reinert
21.05	GÍ-NSÍ	Oddmar Andreasen
21.05	KÍ-FS Vágar	Birgir Sondum

Støðan í bólki 1

	d	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 KÍ	6	4	0	2	17	8	9	12
2 VB	6	4	0	2	15	10	5	12
3 NSÍ	6	3	0	3	10	6	4	9
4 Sumba	6	1	0	5	5	23	-18	3

Valencia í finaluna

Barcelona vann seinnu hálvfinaluna á Valencia 2-1, men eins og hjá Bayern München var hetta ov lítið til at vinna samanlagt

JÁKUP MØRK

Valencia vann nevnliga í fyrru hálvfinaluni heili 4-1á sponsku meistarunum, og við samlaða úrslitinum 4-3, hevur Valencia sostatt leikt seg í finaluna í Champions League, fyri fyrstu ferð í søgu felagsins.

Høvdu tamarhald á

Tað var ongantíð líkt til, at Barcelon skuldi megna at venda gongdini í dystinum mikukvøldið. Valencia hevði so at siga alla tíðina tamarhald á støðuni, og satt at siga tóktist mótstøðuliðið alt ov stirvið, tá teir royndu at bróta ígjøgnum vælskipaðu valencia verjuni.

Esini var líkt til, at Barcelona tóktist vera bangnir fyri mótálopum frá Valencia, og tískil hevði útliðið meginpartin av dystinum gott tak á miðvøllinum, har teir vóru í yvirtali í mun til mótstøðuliðið.

Tá so liðskiparin, Mendieta, í seinna hálvleiki langaði bóltin í netið til 1-0 leiðslu til Valencia, tóktist samlaði sigurin at vera vísur, og hóast Frank De Boer og Philip Cocu skoraðu hvør sítt mál móti endanum av dystinum, so kom samlaði sigurin ongantíð í vanda.

JH

Kurt slerdi fast

Norskur fótbóltur: *Fyrsti sigurin í hesum kappingarárinum kundi verið heilt sannførandi, men síðstu løtuna tóku teir í Sogndal sær av løttum*

Í fjórðu royndini eydnaðist tað hjá Sogndal við Juliani Johnsson og Kurt Mørkøre á liðnum at vinna fyrsta sigurin í hesum kappingarárinum. Frammanundan hevði Sogndal spælt tvær ferðir javnt og tapt eina ferð.

Mikukvøldið var Sogndal á útivølli móti Eik–Tønsberg, sum hevur havt eina syndarliga byrjan. Sogndal vann 5–3, og tey trý málini vóru tey fyrstu yvirhøvur, sum framvegis stigaleysa Eik–Tønsberg hevur fingið í hesum kappingarárinum.

Kurt Mørkøre skoraði eitt av málunum hjá Sogndal. Í 66. minutti økti hann leiðsluna til 5–1. At leiðslan 25 minuttir undan leikloki var so trygg tóktist bera við sær, at teir í Sogndal síðstu løtuna ikki tóku uppgávuna í so stórum álvara, sum teir høvdu gjørt frammanundan.

Hetta hevði við sær, at Eik–Sogndal fekk tvey mál afturat. Teir minkaðu um munin til 2–5 og 3–5 í ávikavíst 83. og 87. minutti.

Sogndal, sum er á áttanda plássi, hevur fimm stig. Teir hava skorað níggju mál, og níggju mál eru farin ígjøgnum.

Sunnudagin fær føroyska liðið í norskum fótbólti vitjan av Tromsdalen, sum er á triðja plássi við níggju stigum.

JH

Gunnar vann Triatlon

Farna vikuskiftið varð kappast í sprint-tritatlon, og gjørdist úrslitið, at Gunnar Dahl Olsen gjørdist greiður vinnari

Ein av heimsins mest krevjandi ítróttakappingum. Soleiðis verður ofta tikið til, tá tosað verður um vælkendu iron-man kappingina á Hawaii, sum er størsta og kendasta kappingin innan triatlon.

Á hesi svimja luttakararnir 3,8 km, súkkla síðani 180 km, fyri síðani at enda við eini marathon renning, sum er góðar 42 km.

Sanniliga nakað, sum kann fáa flestu okkara at missa ondina, bert við hugsa um tað, men triatlon er eisini ein ítróttagrein, sum kappast verður í her heima.

Sprint

Tað er tó ikki í fullari útgávu at kappast verður í Føroyum, men hinvegin er ivaleyst eisini nóg strævið at luttaka í sonevndu sprint-triatlon kappingini, sum varð skipað undanfarna vikuskiftið.

Teinarnir eru her nakað væl styttri, men fyri at fullføra svimjingina (750 m), súkklingina (22 km) og renningina (5,5 km), er púra greitt, at tú noyðist at vera í góðari venjing.

Sum tað framgongur av úrslitunum niðanfyri, so gjørdist Gunnar Dahl Olsen ein rættuliga greiður vinnari, meðan Tony Ditlevsen og Kári Brattaberg eisini vóru sannførandi sum ávíkavist nr. 2 og 3.

Ikki heilt óvæntað var tað serliga í súkklingini, at Gunnar legði sjógv millum seg og mótstøðumenninar, men umframt at vinna greitt í hesi greinini, so megnaði hann eisini at gerast næstbestur í bæði svimjing og renning, so samanumtikið var einki at ivast í, at talan varð um rætta vinnaran

Úrslitið av kappingini:

1 Gunnar Dahl Olsen 1.14,43
2 Tony Ditlevsen 1.17,00
3 Kári Brattaberg 1.19,04
4 Evald Rasmussen 1.23,26
5 Beinir Rasmussen 1.24,22
6 Høgni Øster 1.26,23
7 Rókur í Jákupsstovu 1.26,24
8 Kári Simonsen 1.36,37

SKOGRØKT LANDSINS

Sølan av trøum og runnum

er byrjað á Gróðurstøðini, Hvítanesvegi 3, Hoyvík.

Í mai og juni mánaða verður opið soleiðis:

Mánadag–fríggjadag: Kl. 12–17
Leygardag: Kl. 10–14
Sunnu- og halgidagar: Stongt

Last- og kranavognskoyring

Øll last- og kranavognskoyring við grabba. Last 3 m³. Krani 1800 kg.

Tlf. 312779 & 281478

Norðoya Fornminnasavn

Frá 15. mai til 15. september er framsýningin á savninum opin hvønn dag kl. 14–16.

Norðoya Fornminnasavn

Starv hjá Føroya Skúlabókagrunni

Eitt starv hjá Føroya Skúlabókagrunni verður lýst til setanar frá 1. august 2000.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við útgávu av fjølbroyttum undirvísingarmiðlum. Ein partur í starvinum verður at kunna seg við tørvin á nútíðarbærum undirvísingarmiðlum, lærugreinum og undirvísingarevnum, eina helst í fólkaskúlanum, eisini í teld og teldutøkum útgávum. Upplæring kann verða neyðug.

Til starvið krevst læraraútbúgving til fólkaskúlan, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki og hollur kunnleiki í føroyskum og í teld.

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálastýrisins. Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi í seinasta lagi 6. juni 2000. Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, Heðini M. Klein, telefon 316100.

Tórshavn, 5. mai 2000

Føroya Skúlabókagrunnur
Skúlabókanevndin
Lützenstrød 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar Øki

4 størv á Toll- og Skattstovu Føroya Streymoyar øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, eru 2 størv leys at søkja til setan 1. juni 2000 ella so skjótt til ber og 1 avloysarastarv/hjálparastarv við kassan til setan frá nú og til ársenda 2000.

2 føst størv umframt 1 avloysarastarv

Arbeiðsuppgávur:
Málsviðgerð innan skatt, mvg, toll og innheinting.

Førleikakrøv:
Fyrimun hava umsøkjarar, ið hava lokið HH-prógv, merkonom e.l., ella hava aðra viðkomandi útbúgving og royndir innan almenna ella privata umsiting. Viðkomandi, ið settur verður, skal helst hava kunnleika til teldu á brúkarastøði, og hava góð evnir at orða seg bæði skrivliga og munnliga. Harumframt skal viðkomandi kunna arbeiða sjálvstøðugt, hava góð samstarvsevni og vera arbeiðssamur.

Útbúgvingar- og eftirútbúgvingarmøguleikar:
Toll- og skattstovan bjóðar starvsfólkunum ymsar innanhýsis útbúgvingar. Møguleiki er eisini at útbúgva seg uttanhýsis við ávísum stuðli frá stovninum. Kravt verður at viðkomandi, ið settur verður, luttekur í øllum viðkomandi innanhýsis útbúgvingum, og helst eisini í viðkomandi uttanhýsis útbúgvingum.

Lønar- og setanartreytir:
Løn og setanarviðurskiftir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsroyndum frá øðrum starvi/størvum. Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara. Tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

1 avloysari/hjálparfólk til kassan

Arbeiðsuppgávur: Vanligt kassaarbeiði, inn- og útgjøld umframt annað arbeiði í sambandi við kassan.

Førleikakrøv: Umsøkjarar við kunnleika til kassa/avgreiðsluarbeiði hava fyrimun. Viðkomandi verður harumframt upplærdur á staðnum.

Lønar- og setanartreytir: Setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og lønin eftir 15. lønarflokki í sama sáttmála.

Umsóknir:
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, møguligum ummælum og upplýsing um starvsroyndir skulu sendast innan 26. mai 2000 til:

Toll- og Skattstovu Føroya
Streymoyar Øki
Postboks 3139
Smyrilsvegur 7
FO 110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Streymoyar øki, Eyðfinn Hansen, økisstjóra á tlf. 310260.

Um Stovnin
Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær 6 økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og Tórshavn, røkja raksturin. Í Streymoyar øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast í løtuni 55 fólk.

Almanna- og Heilsumálastýrið

ENDURUPPSLAG

Fulltrúi

Vegna ov fáar umsóknir, verður starvið sum fíggjarfulltrúi í Almanna- og heilsumálastýrinum lýst leyst av nýggjum.

Uppgávan er í høvuðsheitum:

- at hava eftirlit við fíggjarligu gongdini á játtanunum innan § 8 í fíggjarlógini
- at ráðgeva og vegleiða teim ymisku stovnunum viðvíkjandi gerð av fíggjarætlanum og uppfylging av hesum, soleiðis at fíggjarliga tilfeingi verður nýtt sum ætlað og í mun til aktivitet og kapacitet.
- at skipa data og gera fráboðanir á øllum stigum
- at tryggja nøktandi leiðslukunning
- saman við roknskaparøkinum at tryggja eitt vælskipað datagrundarlag

Førleikakrøv:
Viðkomandi útbúgving innan fíggjarliga økið frá hægri læristovni, sum t.d. cand. merc., cand oceon ella líknandi.
Fólk við royndum/kunnleika innan arbeiði við fíggjarstýring hevur fyrimun.
Ert tú í ferð við at gera teg lidnan við lesna, hevur tú eisini møguleika at søkja.

Vit bjóða:
Sjálvstøðugt starv, til tíðir strævið, men eisini áhugavert, við fjølbroyttum uppgávum.
Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar.
Samstarv við aðrar fíggjarfulltrúar.

Løn- og setanartreytir:
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.
Setanarøki er alt Almanna- og heilsumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovan.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mary í Garði, fíggjarstjóra, tlf. 35 40 43

Umsókn:
Umsókn við avriti av prógvum skal sendast til:
Almanna -og heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 26. mai 2000, kl. 14.

Lýsing

Viðv. upptøku til búpláss á Eldrasambýlinum

Við tað at heimið verður tikið í brúk, ætlandi 1. sept., fáast umsóknarbløð til búpláss við at venda sær til:

Býráðsskrivstovuna í Vági
Tlf. 37 30 24